


Poul Jóhannus Justinussen er upprunaliga úr NSÍ, men tað er fyrst og fremst í Gøtu og á Toftum, at hann hevur gjørt vart við síni fótbóltsevni

Mynd: Álvur Haraldsen

# Stórtrívist á Toftum

## Ungi glyvramaðurin á B68-liðnum væntar gott úrslit í ár

Millum tey mongu nøvnini á málskjúttum í føroysku kappingini í fyrraárið, stakk eitt nýtt navn seg brádliga fram úr rúgvuni. Og tað var sanniliga eisini gjørt við manér, tá ungi glyvramaðurin á liðnum hjá GÍ gjørdi ikki mætari enn at skora fimm ferðir á rað fyri lið sítt í Formuladeildini.

Pól Jóhannus Justinussen var við eitt ikki longur ókendur, men eitt navn, mótstøðuliðini í teimum fylgjandi dystunum noyddust at seta sær á blokkin, tí honum mátti ansast eftir. Og kanska ansaðu tey eisini betur eftir, tí hann fekk bara tað eina málið aftrat kappingarárið 2007.

Í fjør var Pól Jóhannus so aftur at síggja í barndómsfelagnum, NSÍ, men har fingu tey ikki í nóg stóran mun eyguni upp fyri, hvussu best og mest fekst burtur úr honum. Spælitíðin var eisini so lítil á besta liðnum hjá NSÍ, at hann tók av, tá B68 í summarsteðginum lá framvið – og har er hann enn.

**Trívist á Toftum**

– Eg havi fingið eina góða móttøku í B68 og trívist væl saman við spælarunum og teimum, sum eru rundan um liðið. Her sleppi eg eisini at spæla á mínum favorittplássi, sum er í miðverjuni, so hetta passar mær í allar mátar sera væl, sigur Pól Jóhannus, sum letur væl at manningini hjá B68 í ár.

– Her er nógv gott fólk, og eg haldi, at hópurin hjá okkum er betri enn í fjør. Tað hevur gingið hampuligt í venjingardystunum, har vit hava roynt so nógv ymiskt, at eg haldi ikki, at vit enn hava spælt nakran dyst við besta liðnum inni í senn.

Í miðverjuni hjá B68 spæla Pól Jóhannus, sum fylti 20 ár í januar, og 26 ára gamli Jóhan Dávur Højgaard, og samstarvið teirra millum hevur riggað væl higartil.

– Vit eru nokk so líkir og tað er ikki soleiðis, at annar okkara er stýrimaður, tí vit skiftast væl um at stýra verjuni, sigur Pól Jóhannus, sum væntar, at B68 kann skifta sættaplássið í fjør út við eitt av hægru plássunum í ár.

– Eg vænti, at tað fer at ganga rættiliga væl hjá okkum, so um vit megna at spæla alt árið, sum vit gjørdu í seinnu hálvu av kappingini í fjør, trúgvi eg upp á eitt fjórðapláss ella okkurt oman fyri tað.

**Ætlar sær uttanlands**

Fyribils tekur Pól Jóhannus Justinussen hetta árið í B68, men so kundi hann hugsað sær at farið uttanlands at roynt seg. Um tað ber til, ætlar hann sær í næsta ár í fyrsta umfari til Danmarkar, og so fæst at síggja, hvussu langt tað kann røkka.

– Eg var í Brøndby og royndarvandi í páskafrítíðini í fjør, men tá gekst einki serligt. Nú veit eg tó eitt sindur meira um, hvussu tað er at koma inn í ein nýggjan hóp í einum øðrum landi. Tað krevur í øllum førum gott tol, skalt tú røkka málinum, sigur Pól Jóhannus.

Síðstu trý árini hevur hann verið á ungdómslandsliðunum, sum eru ein góður sýnisgluggi hjá ungum og vónríkum spælarum. Í tvey ár var hann á U19-landsliðnum, og í fjør kom hann á U21-landsliðið, har hann kom inn í 1-1 javnleikinum ímóti Aserbadjan og spældi allan dystin í 0-1 tapinum ímóti Grikkalandi.

– At spæla á U21-landsliðnum og fáa royndir í Vodafonedeildini skuldi givið mær góða barlast, eg kann taka við mær. Eg kann so altíð vóna, at onkur fær eyga á meg í onkrum av landsdystunum, so ein góður møguleiki stingur seg upp fyrr ella seinni, sigur Pól Jóhannus Justinussen, ið tó fyrst ætlar sær at taka eitt tak fyri B68 hetta kappingarárið.

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

### Metingin

**Eftir nøkur trupul ár, sær B68 út til aftur at hava fótað sær á ovastu rók. Spælararnir eru nú eitt ár eldri og royndari, og megna teir at halda fast í góðu taktunum frá seinnu kappingarhelvt í fjør, kann roknast við, at liðið á Toftum aftur í heyst er at finna millum liðini, ið enda miðskeiðis á stigatalvuni. B68 sær styrkt út, men vantandi royndir eru helst størsti veikleikin hjá liðnum.**